# Fjórða bindið um Gjáar søgu

**Jákup Thorsteinsson ummælir fjórða bindið av stórverkinum hjá Petur Jacob Sigvardsen um Gjáar Søgu, sum hann nevndi Gamla tíðin 2. Forlagið Búgvin hevur givið út bókina**

UMMÆLI

*Jákup Thorsteinsson, dr. phil*

Petur Jacob Sigvardsen hevur latið úr hondum 4. bindið av stórverki sínum, sum ber heitið »Úr Gjáar søgu«.

Tey bæði fyrstu bindini bera heitið »Barnaminni« 1 og 2. Triðja bindið, »Gamla tíðin 1«, kom út í fjør, og nú kom so fjórða bindið av hesum valaverki, sum ber heitið »Gamla tíðin 2«.

Fyrsta bókin kom út í 1997, og øll tey mongu, sum síðan tá hava ognað sær hetta verk, hava kunnað frøtt seg um tær áhugaverdu frásagnirnar, sum eru lagdar fram á ein livandi og samstundis nágreiniligan hátt, sum sýnir tað stóra innlit, høvundurin hevur í tað sera fjølbroytta evnið, hann leggur fram fyri lesaran, sum verður bergtikin bæði av frásøguhátti og tí dygdargóða føroyska málinum, sum í sjálvum sær er eitt satt prýði fyri verkið.

Um tað, sum Petur Jacob higartil hevur latið úr hondum, er sagt, »at verkið er ótrúliga væl skrivað, lært og vandaliga gjørt. Tað er meistarliga sett saman og er eitt virðismikið rit, sum ikki bert kann frøa gjáarfólk, men allar føroyingar, tí her er til skjals ein bygdarsøga, sum man vera tann besta av sínum slagi, sum skrivað er her á landi«.

Tað er Hans Jacob Debes, professari, sum tók soleiðis til í ummæli sínum 13. desember í fjør, og fáur mundi dugað betur at ummæla verkið hjá Petur Jacob enn hann, sum eins og høvundurin er gjáarmaður, og tí hevði heilt serligar fortreytir at liva seg inn í og skilja øll tey sermerktu viðurskifti bygdini viðvíkjandi, sum Petur Jacob hevur lýst so væl og so hugtakandi.

Nýggjasta bókin hjá Petur Jacob er ikki lítið verk. Gamla tíðin 2 fevnir um 333 væl skrivaðar síður og 21 kapitlar. Meðan Gamla tíðin 1 fevnir um m.a.: bygdarnavnið, forna búseting, hagan og bjørgini, jarðarbýti, bø og gerði, torv og torvheiðar, haga, útróður, Norðhavsmið, mið, plinkar og rákaleiðir, báts- og skipsvanlukkur og bjargasøgur, so eru í tí nýggju bókini, sum ber heitið Gamla tíðin 2, greinir um: kommunuviðurskifti, gudslívið, kirkjuviðurskifti, skúlaskap í gomlum døgum, tað fjølbroytta felagslívið, rithøvundar, politikk, gamlar frásagnir, skemtisøgur og mangt annað. Serliga áhugaverdar eru óivað frágreiðingarnar um Jóannes tann Vísa og Dandadrongin. Men samstundis skal gerast vart við, at greinirnar um gudslívið, kirkjuviðurskiftini, skúlaskapin og tað virkna felagslívið í bygdini hava stóran siðsøguligan og mentasøguligan týdning.

Gamla tíðin 2 er í sjálvari sær ein stór bók, eitt mikið verk, sum nágreiniliga viðger so mong viðurskifti í søguni hjá gjáarfólki. Kelduávísingarnar í hesum báðum seinastu bókunum eru tilsamans 465, og tað sigur seg sjálvt, at tað er ikki gjørligt at koma inn á alt tað tilfar og øll tey mongu og fjølbroyttu evni, sum tikin verða til viðgerðar og lýst í hesi miklu frágreiðing, sum byggir á eina so ovurhonds stóra mongd av keldutilfari, at tað í sjálvum sær er eitt satt bragd at viðgera tað og skriva burtur úr tí eina so væl skipaða bók, sum hesa, ið Petur Jacob fyri fáum døgum síðani hevur latið lesarunum.

Hann byrjar við frásøgn um Funnings sóknar kommunu og greiðir síðani frá Gjógv sum sjálvstøðugari kommunu. Á hesum bakstøði fer hann síðani undir at viðgera tann áhugaverda siðsøguliga kapittilin, ið snýr seg um gudslívið hjá bygdarfólki sínum. Vit lesa um gamlar dagar, tá ið Funnings kirkja var sóknarkirkja hjá gjáarfólkum. Men Petur Jacob leitar heilt aftur til tíðina eftir siðaskiftið, tá Eiði, Funningur og Gjógv høvdu eina kirkju, sum var á Eiði. Myndugleikarnir hildu hetta vera nóg mikið, tí so fá fólk búðu í hesum bygdum; men »af Årsag at svage Folk døde på Vejen til Ejdes Kirke, som lå længere borte«, fóru funnings- og gjáarmenn undir at byggja lítla kirkju í Funningi.

Viðurskiftini, sum tey vóru frá hesi tíð og fram til Gjáar kirkja stóð liðugt bygd í 1929, eru lýst við serligum atliti at trúarviðurskiftunum og við áhugaverdari lýsing av kristnilívi bygdarfólksins, og Petur Jacob greiðir við stórum innliti frá heimalestri, messu, dópi, bønarhaldi og jarðarferð. Í hesum sambandi er eisini áhugavert at lesa um tilhaldshús í Funningi, Kirkjustein og virksemi prestanna.

Við støði í frásøgnini hjá m.ø. Lucas Debes greiðir rithøvundurin frá, at tað er sannlíkt, at fedrar okkara í øldir hava lisið lestur heima við hús sunnu- og halgidagar. Hetta hevur verið ein sera týdningarmikil partur av kristnilívi teirra. Hann greiðir frá gomlum lestrarbókum, sálmabókum og teimum gomlu Kingosálmunum, sum avlagdir vórðu tíðliga í farnu øld. Men, sum hann tekur til, so livdu Kingosálmarnir tó í hjørtum teirra mong ár eftir hetta, og stundum hoyrdi tú teir eisini ljóma so fagurliga fyri oyrunum á tær, tá ið gomul fólk sungu teir.

Siðir bygdarfólksins í sambandi við trúarlívið, sum var so avgerandi partur av tilvitsku hins einstaka, eru lýstir á ein hátt, sum bert tann megnar at gera tað, ið vaksin er upp á plássinum og hevur innlivað seg í gomlu mentanina, sum merkti gamla føroyingin. Lýsingin av Gjáar kirkju, - teirri fyrstu og tí søguligu kirkjuvígsluni á móðurmálinum, teimum, sum har hava virkað, týdningi kirkjunnar fyri bygdina, er nakað heilt fyri seg, sum man vera ein sonn frøi at lesa hjá teimum, sum hava atknýti at Gjáar bygd.

Petur Jacob, sum er útbúgvin lærari, hevur verið lærari í mong ár. Men hann var eisini deildarleiðari í Landsskúlafyrisitingini í langa tíð. Arbeiði hansara, bæði sum lærari og seinri sum fyrisitari av føroyska fólkaskúlanum, lærarskúlanum v.m., hevur givið honum eitt innlit í viðurskifti skúlans, sum fáur annar. Frágreiðing hansara um skúlaskap í gomlum døgum er merkt av, at hetta er eitt evni, sum stendur hjarta rithøvundsins nær. Eisini í hesum kapitlinum fer hann langt aftur í søguna – heilt aftur í Føroyingasøgu. Síðani fer hann fram til trúbótina, latínskúlan og týdning hansara fyri menningina av føroyska samfelagnum. Hann viðger m.a. Lucas Debes og frágreiðing hansara um kristnikunnleika føroyinga, og hvussu børnini lærdu at lesa. Um heimaundirvísingina slær hann fast, at tað er neyvan ov mikið sagt, at heimaundirvísingin hevur í øldir verið álitið hjá mongum barni.

Men samfelagsliga menningin hevði tað við sær, at heimaundirvísingin ikki var nóg mikið í longdini. Skúlar vórðu bygdir, lærarskúlin settur á stovn (1870), og lærarar komu í Funningi og við Gjógv. Undirvísingin varð støðugt betur skipað, og í 1919 fekk Gjógv so sín fyrsta lærara. Skúlanevndir verða umrøddar, og frágreiðing er gjørd um skúlabarnatalið. Víst verður á talandi stabbamyndina á síðu 103, sum m.a. vísir, at í 1941 vóru 53 børn í Gjáar skúla, og nú um aldaskiftið er skúlabarnatalið 3. Í kapitlinum um Fólkateljingar og Fólkatalsyvirlit er at finna áhugavert hagfrøðiligt tilfar, har m.a. gongdin í fólkatalinum frá 1780–2000 er nágreiniliga lýst. Høvundurin vísir á, at tann fólkavøkstur, sum vardi stívliga 160 ár (fram til 1941), varð síðan sogin burtur eftir sløkum 60 árum, og nú eru næstan bert eldri fólk eftir í hesi fyrr so blómandi bygd.



Partur av Gjáar bygd í 1920-unum.



Á grynkuni í Gortruánni liggur enn tann stóri, rundbølluti steinurin og hvílir á einum tríhyrntum klípi, sum er sjónskt at síggja á myndini.



Bygdarmynd uml. 1911.

At bygdin veruliga hevur staðið í blóma, verður lýst í kapitlinum um Felagslívið. Her er serliga at leggja til merkis siðsøguligu lýsingina av føroyska dansinum, har rithøvundurin í huganum leitar inn í roykstovuna á Gamla Fløtti 2. jólakvøld og tekur lesaran við sær aftur í forna føroyska mentan, sum enn var livandi við Gjógv í unglingárum hansara. Men felagslívið hevði eisini aðrar tættir, og víst kann her verða á tað, sum skrivað er um felagið Norðlýsið, Gjáar Framburðsfelag, barnafelagið Framtíðina, sum lærarin Jóhan Kallsoy stovnaði, og skúlabarnablaðið Smæruna. Eisini eru Fólkafundirnir lýstir væl og virðiliga, og greitt er frá Háskúlarørsluni og týdningi hennara fyri heimbygd høvundsins. Seinast í hesum kapitli verður greitt frá mentamanninum Jóhan Kallsoy, sum var lærari við Gjógv í 25 ár, og tí týdningi, hesin merkismaður hevur havt fyri Gjáar bygd.

Í kapitli fyri seg verður greitt frá Rithøvundum tá í tíðini, sum Gjáar bygd hevur fostrað, ella sum hava havt atknýti at bygdini. Tann kendasti av hesum á okkara døgum man uttan iva vera Sigurð Joensen. Gjáar bygd er kend sum ein av háborgum sjálvstýrismanna, og Petur Jacob viðger hetta evnið í serligum kapitli, sum hann nevnir Politikkur.

Í kapitlinum Sagnir og søgubrot er nógv forvitnisligt at lesa. Her skal serliga verða víst til »Svarta dála« og »Galdrandi grát í Gjónni«. Tó ikki minni forvitnislig er frásøgnin um Dandadrongin, sum er viðgjørd í kapitlinum »Dandadrongurin – profetur ella trúarvillingur?«.

Jacob Olesøn, ella Dandadrongurin, sum hann vanliga var nevndur, var føddur umleið 1643. Heilsan var ring, ofta lá hann í andaleypi; men hann segði, at hann doyði ikki, fyrr enn stundin var komin, og hana kendi hann væl. Nøkulunda soleiðis byrjar Petur Jacob frásøgn sína, og hugtekur hann straks áhuga lesarans, tí hvør og hvat var hesin sjúkligi drongur, sum sá sjónir og fekk opinberingar?

Vit fáa at vita, at í januar 1667 var Dandadrongurin vaktur á nátt av manni í skínandi hvítum klæðum, sum lærdi hann bøn á donskum máli at siga tríggjar ferðir um dagin. Bønin er endurgivin í frásøgnini, og skuldu allir føroyingar biðja hana tríggjar ferðir um dagin. Tá hann hevði givið Dandadreinginum boð síni, hvarv maðurin í hvítum klæðum upp gjøgnum ljóaran. Hetta var ein av fleiri sjónum, sum vóru Dandadreinginum fyri. Hann fekk boð um at halda leygardagin heilagan og at áleggja gjáarmonnum at syngja ávísan sálm, tá teir fóru til útróðrar. Tað, sum Dandadreinginum var fyri, gjørdi, at hann var í miklum mæti millum manna, og hann nýtti evni síni at hjálpa fólki á mangan hátt. Eisini fekk hann viðhald og undirtøku frá fólki, sum byrjaðu at halda leygardagin heilagan og búgva seg til tær seinastu tíðirnar.

Sjálvandi endar frásøgnin við, at hesin sjáldsami ungi maðurin kom í andsøgn við kirkjuligu myndugleikarnar (ortodoksiina), sum ikki vildu lata sær lynda slíka falstrúgv, sum Lucas Debes umrøddi sum spøkilsi og Sátans verk. Einsamallur, fallin og forfjónaður mátti trúðarvillingurin frá Gjógv tí standa í Havnar Kirkju og lýða á revsing sína og dómin frá harra Lucasi. Eftir hesa hending, tá ið Havnar Kirkja man hava verið stúgvandi full av fólki, hvarv Dandadrongurin úr søguni. Her endar frásøgnin um gjáardrongin við teimum serligu gávunum, sum hann nýtti at dugna fólki við, men í eygum myndugleikanna var hann trúarvillingur – og tí revsaður.

Ein drúgvur kapittul er Um tey fornesku. Mangar eru huldusøgurnar frá fornari tíð, og eisini við Gjógv hava mangar frásagnir um tey fornisku livað á manna munni. Petur Jacob greiðir m.a. frá teimum umleið Huldulonum 50, ið skuldu vera millum Funning og Gjógv, og um neytakonur, torvfólk og onnur, ið greiddu frá hulduneytum og huldufólkum, ið skuldu vera sædd har á leiðini, og sum vituligt búðu í huldulonunum. Á Eiðisskarði skuldi vera stúgvandi fult av huldufólkum, og tí verður greitt frá, at her ráddi bæði um vit og skil og virðiligan atburð, skuldi ferðamaðurin koma snikkaleysur um skarðið.

Greitt verður eisini frá íbygdum steinum, hulduróddum og sambandi millum kristin fólk og huldufólk. Í hesum sambandi er serliga áhugaverd tann dramatiska frágreiðingin um tær tríggjar neytakonurnar, sum vóru illa staddar av mannúlvi, men vórðu bjargaðar á óskiljandi hátt. Petur Jacob greiðir eisini frá, at Viderø prestur og hann mangan talaðu saman um tað, ið er millum himmals og jarðar, og sum mannaheili ikki dugir at greina.

Upp í gamla bygdarmentan hoyra eisini søgur um Roysni og brøgd. Petur Jacob greiðir tí eisini frá, tá ið menn rættu tong, og um høvini, sum bert sterkastu menn megnaðu at lyfta. Greitt verður eisini frá pátrúgv og gomlum heimaráðum sum at lesa rusk úr eyganum, og hvussu tey hjálptu sær fyrr, og í serligum kapitli fyri seg er ævintýrið Drongur kongur.

Tveir merkismenn fáa serliga viðgerð móti endanum á bókini. Teir eru: Heini bóndi í Jákupsstovu og Johannes Poulsen, sum millum manna var mest kendur sum Jóannes tann Vísi. Petur Jacob ger serliga nógv burtur úr lýsingini av hesum manni. Jóannes tann Vísi, sum var føddur 25. september 1776, hevur verið sera evnaríkur maður, og frágreiðingin um tað, sum hesum manni var fyri, fevnir um 51 blaðsíður í bókini. Jóannes tann Vísi var í miklum mæti millum manna, álitismaður í bygdini, framtakshugaður, heiðurligur og vitugur, og evni hansara fevndu bæði um tøknilig viðurskifti (klokkumakari), jarðarviðurskifti (gjørdi nýtt jarðarbýti í Funningi og við Gjógv, og var sum jarðarbýtari kendur fyri rættvísi sítt) og samfelagsligt innlit. At hann var framtaksmaður á hesum seinast nevnda økinum, kemur greitt til sjóndar í samstarvi hansara við Nólsoyar Páll, har hann eitt skifti var stýrimaður á Royndini Fríðu og stríddist har saman við Nólsoyar Pálli - og seinni sum útsendingur føroyinga fyri fríari handli og framburði her á landi. Hetta gjørdi, at myndugleikarnir, donsku embætismenninir í Havn, fingu ilt eyga á honum.

Ólukka hansara varð, at hann hevði teknað ein peningaseðil, børnum sínum til leiku. Hesin seðil kom í hendurnar á funningsmanni, sum so læt hann upp í hendurnar á embætismonnunum í Havn, og hevði hetta tær óhepnu avleiðingar, at Jóannes varð skuldsettur fyri at gera falskar peningaseðlar. Við støði í eini rúgvu av skjølum, sum Petur Jacob hevur funnið, greiðir hann so gjølla frá hesum margháttliga máli. Hann fer sera gjølla ígjøgnum hesi mongu skjøl, og hann setir sær fyri – í hesi drúgvu viðgerð – at prógva, at tann teknaði peningaseðilin var í hondum Løbners »tað henta politiska vápnið, sum ein ógegnigur embætismaður í berari hevnisøku misnýtti til tess at knúska og jarðleggja heiðursmannin Jóannes tann Vísa«. Petur Jacob hevur sett sær tað mál at bjarga eftirmælinum hjá hesum mæta, framtakshugaða føroyingi, og hetta ger hann við drúgvum prógvgrundum og tekur samanum í endaligari niðurstøðu, ið er sera væl undirbygd, og sum vísir, hvussu væl rithøvundurin hevur dugað at greina hetta rúgvusmikla skjalatilfar.

Bókin Gamla tíðin 2 endar við frásøgn um Petur Hans Sigvardsen og um eftirnøvnini Sigvardsen og Sivertsen. Her greiðir Petur Jacob frá ættarfólkum sínum í faðirættini og vísir á, hvussu bland er komið í eftirnøvnini, so at øll ættarfólk hansara hava ikki sama eftirnavnið. Hetta var ikki ókent í eldri tíð, tá ið danskir (og føroyskir!) prestar fesjaðu við nøvnum føroyinga, sum teimum líkaði best.

…….

Við teimum 4 bindunum um Gjáar søgu hevur Petur Jacob latið úr hondum stórverk um heimbygd sína – og mætastu bygdarsøgu, sum skrivað er á føroyskum. Hann hevur sjádsama gott minni. Tað eru báðar tær fyrstu bøkurnar prógv um. Men hann dugir eisini sera væl at nýta tað ovurstóra skjalatilfar, sum er grundarlagið undir øllum verkinum. Hann hevur havt samrøður við fólk, tikið upp á band og skrivað niður. (Dømi: Í kapitlinum um fólkateljingarnar hevur hann húsanøvnini við, og hesi nøvn hevur hann fingið frá heimildarfólkum). Hann hevur biðið bygdarfólk síni lesa tað, hann hevur skrivað, og ein av heimildarmonnum hansara er faðirin, Karl Jacob Sigvardsen.

Spurdur um málsliga støði sítt svarar hann, at í barnaheimi hansara var móðurmálið nógv virt, at dentur varð lagdur á góðan málburð, og at lærarin Jóhan Kallsoy hevur havt stóran týdning fyri málsligu menning hansara. Harumframt kom so uppvøksturin í bygdini, har føroyska málið var óspilt í unglingaárum hansara.

Bæði tá tað snýr seg um málburð, frásøguhátt og viðgerðina av skjølum og øðrum keldum, sum eru grundarlagið undir verkinum »Úr Gjáar søgu«, hevur gjáarmaðurin Petur Jacob Sigvardsen stóran heiður uppibornan.

Hetta stóra bókaverkið við 115 kapitlum og 465 undirgreinum á 1350 síðum er prentað og innbundið á Einars Prent. Bøkurnar eru at fáa í skreytútgávu, og tær eru av sonnum eitt frálíkt prentlistaverk og eitt satt prýði fyri føroyskt prenthandverk. Bókaverkið er at fáa í bókabúðum landsins og beinleiðis frá Forlagnum Búgvanum, Tórshavn.